# TILTØK

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Leygardagin kl. 13.30 til 17 verður skeið fyri samkomuleiðarar og onnur ábyrgdarfólk í samkomuini, undirvísari verður Tony Sargent. Evnið verður »Týdningurin av bønarlívinum í samkomum okkara«. Ungdómsmøti kl. 20.30 har Tony Sargent talar. Sunnumorgunin kl. 10.30 Familjumøti har Tony Sargent talar um evnið »Krossurin« og á tilbiðjanarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um reformatorin Martin Luther. Barnaansing fyri børn undir skúlaaldur verður á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin verður kl. 12 og tá er síðsta freist at lata skógvaeskjunar til Christmas Child inn. Øll eru vælkomin.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Dánjal á Dul Jaocbsen, evnið: Jesus og lógvin…
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Tummas Juul Askham, kl. 14 Sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Mikumorgun kl. 7 Bøn.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mikudagin 27. okt. kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið møtir. Ung frá 13 ár og uppeftir eru vælkomin við.

**Meinigheitshúsið**
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hósdagin kl. 16-17 venur Gentukórið, 8 ár og eldri.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Fríggjadagin kl. 19.30-21.30 Juniorhugni, frá 5. flokki.
Leygardagin kl. 9.30-12 Foreldur og børn.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Gunnar Reynslág, Miktam syngur.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í dag kl. 17 Bøn fyri býnum og Ísrael, kl. 19 Delli.
Fríggjadagin kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Familjumøti, innsavnan av gávueskjum, kl. 18 Valkvøld, umboðan úr øllum flokkum.
Mánadagin kl. 20 Felags bønarmøti í Evangeliihúsinum við Meinigheitini í Hoyvík.
Um tær tørvar persónliga samrøðu og/ella forbøn ring 211067. Telefonin svarar man-frí frá 8-16.
www.filadelfia.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti.
Barnarøddir venja kl. 17.30.
Mennirnir samlast kl. 19.30.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið – allar kvinnur eru vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Frá Ebenezer**
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði fyri børn 9 ár og eldri, kl. 19.30 Sangvenjing, Ebenezerkórið, kl. 21 sangvenjing ungdómskórið.
Mikudagin kl. 16.45 Sangvenjing – yngra barnakórið, kl. 17.30 AWANA fyri børn í 1. flokki til 4. flokk, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti, talari: Bárður Ljósheim.

**Dunamis Bíbliuskúlin**
Leygardagin 30. okt. skipar Dunamis Bíbliuskúlin fyri einum bíbliuskúladegi í Filadelfia í Havn. Byrjað verður kl. 10 og endað verður kl. 15.00. Evnið er Guds samkoma og samfelagið. Ikki er neyðugt at melda seg til bíbliuskeiðið. Kostnaður 150 kr. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími og bønarløta. Páll Poulsen talar um samkomurnar í Opinberingini. www.hebron.fo

**Missiónshúsið Libanon, Sørvágur**
Hugnaløta við talu, sangi og drama verður í missiónshúsinum hóskvøldið 28.okt. kl. 20. Høvi verður at lata eina gávu til arbeiðið hjá Sjómansmissiónini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Haldórsvík**
Í kvøld kl. 20 verður Bønarmøti og bíbliutími hjá Elianu og Magnus Olsen. Verið hjartaliga vælkomin á møti.

**Missiónsvika í Funningi 28. til 31. okt. 2004**
Hóskvøldið kl. 20 talar Emil. Olesen, Menn av Strondum syngja.
Fríggjakvøld kl. 20 talar Regin Høgnesen, Petur Hans og Tummas syngja.
Leygardagin kl. 17 Barnamøti v/ Jógvan Højgaard, kl. 20 talar Marius Jacobsen, Jónhilda og Gulak syngja.
Sunnudagin kl. 15 Sunnudagsskúli v/ Kristionnu Johannesen, kl. 18 Niels Jacob Nielsen talar, Leila Højgaard syngur. Innsavnan til Heimamissiónina.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 20 Konsert við I am og Narnia.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Paula Høj, Lisa Frederiksberg syngur. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Lívsins Orð**
Húsbólkarnir møta mikukvøldið kl. 20.
Bólkur 1: hjá Fridu Hansen, Runavík.
Bólkur 2: hjá Gunnvør Holm, Saltangará.
Bólkur 3: hjá Dánjal og Anneth, Saltangará.
Hósdagin Tim. 5 og Liljur kl. 18.30.
Sunnudagin kl. 10.30 Møti.
Mánadagin kl. 20 Ungdómsmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera við drekkamunni verður í Siloa í kvøld kl. 19.30, Bárður á Lakjuni talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími, Áps. kap. 13.
Hóskvøldið kl. 20 kemur Sjómanskvinnuringurin saman.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- & lovsangsløta, kl. 18 Møti v/ Jacob Hendrik Hansen. Innsavnan. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sólarris í Húsavík**
Aglowmøti verður fríggjadagin 29. okt. kl. 19 í Sólarris í Húsavík. Vitjan úr Frelsunarherinum í Havn v/ sangi og vitnisburði. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 15 Familjumøti við drekkamunni aftaná. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Vitnið, Hvalba**
Jørundur Hansen og Símin Ósá tala á møtinum onskvøldið kl. 20.

**Missiónshúsið í Sumba**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Jacob Poulsen og Ebbu Midjord. Nimrod og Ebba syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 25. oktober*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Vit hugsa um jólini
kl. 14-17 Kortspæl, telving, landastrok, bobbspæl, dart og onnur spøl. Møguleiki er at koma sum gestur til døgurðan miku- og fríggjadagin. Tilm. tlf. 316491
*Týsdagin 26. oktober*
kl. 10.00–11.30: Vit syngja. Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15.00: Ábyrgd fyri egnari heilsu. Hvat hevur lívsgleði at týða fyri okkum? Sosial heilsa. Elsa Zachariasen, sjúkrarøktarfrøðingur og ráðgevi
*Mikudagin 27. oktober*
kl. 10.00–13.00: Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 14.00: Túrur til Norðadals við bussi úr Steinatúni, síðani verður gingið úr gomlu bygdini út á Toftir. Tilmelding á tlf. 316491
kl. 17.00–21.00: Opið hús
*Hósdagin 28. oktober*
kl. 10.00–10.30: Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 11.00–11.45: Eingilskt talumál, Ásmundur Johannesen
kl. 14.00–17.00: Telduprát
kl. 14.00–16.00: Boccia í kjallaranum
*Fríggjadagin 29. oktober*
kl. 10.00–13.30: Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12.00: Døgurði
kl. 13.00–17.00: Opið hús.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Pensionistafelagið í Havn**
hevur fund í Losjuni, Tinghúsvegur 18, mikukvøldið 27. oktober kl. 19.00.

**Losjan í Havn Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *ólíkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
er opið mánadag og mikudag frá kl. 14 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Bløðini eru eisini til taks. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi**
– í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum. Tlf. 448279. Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir. Opið mánadag til fríggjadag kl. 15-18.
*Mánadagin 25. oktober*
Fimleikur v/ Jóhannu Troest
*Týsdagin 26. oktober:*
Vit spæla BOCCIA.
*Mikudagin 27. oktober*
Jógvan Fríðriksson, prestur heldur fyrilestur um evnið: »At hava ábyrgd fyri egnari heilsu/tað andaliga«.
*Hósdagin 28. oktober:*
Myndaveving fyri áhugað v/ Rannvu Gøte.
*Fríggjadagin 29. oktober:*
OPIÐ HÚS.

*Hvønn dag ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Tú ert vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Evangeliska Røddin, Odense**
Føroyska sendingin frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

**Ørkin í Reykjavík**
Møti hvørt sunnukvøldið kl. 20.30.
Leygarkvøldið 6. nov.: Hugnakvøld v/ Bjarna Bæk, dómprósti.
Sunnudagin 7. nov. kl. 15.00: Gudstænasta í Háteigskirkju v/ Bjarna Bæk, dómprósti. Aftaná verður kaffi á Ørkini.

**Malta, Hirtshals**
Sunnudag: Kl. 11: Breyðbróting. Kl. 18: Evangeliskur fundur. Mikukvøld kl. 20: Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møti. Eftir fundirnar bjóða vit ein drekkamunn.

**Eliaskirkjan**
Møti er hvørt leygarkvøldið kl. 19 í kjallaranum í Eliaskirkjuni á Vesterbro Torv, Vesterbrogade 49. Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum. Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Sunnudagsskúli er í Eliaskirkjuni hvønn sunnudag kl. 14 í kjallaranum og kl. 11 í barnarúminum á Oyrasundskollegiinum, Dalslandsgade 8 á Amager. Øll eru vælkomin. Nærri fæst at vita frá Atla Rasmussen, tlf. 32969995 ella Róa Rasmussen tlf. 32886480. E-mail: ek_fo@get2net.dk

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll oman fyri 60 ár eru vælkomin.
Gerst limur í Vágs pensionistafelag.

**Spælistovan í meinigheitshúsinum**
er opin mána-, týs- og hósdag kl. 9-12 fyri foreldur við børnum, sum ikki hava ansing.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.00 Stóri bókafundur
Mikudag: kl. 20.00–21.00 Stiga- og siðafundur
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00 og kl. 22.30-23.30
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**NA (Anomymir narkomanar)**
Tinghúsvegur 37
NA-Fundur hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00 á Tinghúsvegnum 37.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17. Síðsta sunnudag í mánaðinum er opin speakarafundur í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Fyribyrgingarráðið**
*Argjaboðagøta 7 · 160 Argir*
*postrúm 135 · 110 Tórshavn*
tlf. 315155 · fax 320272
Teldupostadr.: fyribyrg@fyribyrg.fo
heimasíða: fyribyrg.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr.
Ringið: Ella 316261, Tone 261165, Hans Jákup 778170, Guðrið 314607. Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
*Box 2113, FO 165 Argir*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Heilafelagið**
Íslandsvegur 10 · tlf. 317373
T-post: heilaf@post.olivant.fo
Nærri upplýsingar, eisini við ráðgeving, finst á heimasíðuni: www.mbf.fo undir »Um MBF«.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894.
Fø. Sparikassi 442027-8.

### 75 ár

Mikudagin 27. oktober verður Rósing Rasmussen, Runavík, 75 ár. Opið hús verður í kappróðrarneystinum á Glyvrum frá kl. 16.00.



# Pizzacafé á Káta Horninum

**Gamla Kondittaríið, sum nú eitur Café Kheops, fer framyvir eisini at hava pizza á matarseðlinum.**



Café Kheops hevur nú víðkað um virksemið. Umframt at hava vanliga café í dagtímunum, verður framyvir møguligt at keypa pizza seint seinnapartin og um kvøldið.

29 italienskar pizzur eru á matskránni, umframt tvær barnapizzur og heimagjørt pitabreyð við kebab.

Tað er Nordin Manai, ið umframt at hava matstovuna Marco Polo og barrina Cleopatra í hølinum uppiá, eisini er høvuðsmaður aftanfyri café Kheops, og nú pizzacaféina.

Pizza caféin, sum sambært matarseðlinum hevur rættar italienskar pizzur, er opin mánadag-hósdag 17.00-23.00, fríggjadag-leygardag 17.00-24.00 og sunnudag 17.00-23.00.

–eys–

# Neyvan kreppa sum í 90-unum

BÚSKAPUR
*Terji Nielsen*

Danski Tjóðbankin viðger í sínum "kvartalsyvirliti" fyri 3. kvartal tí búskaparligu støðuna í Føroyum. Teirra niðurstøða er, at tann stóra framgongdin í búskapinum síðani 1995 er vend til eina afturgongd í 2003. Men tað er tó eingin tekin um, at gongdin fer at geva eina líka stóra kreppu, sum fyrst í 90'unum, tí tey síðstu 10 árini hava tað almenna og tey flestu virki og húsarhald konsoliderað seg munandi.

Tjóðbankin vísur á, at lønarútgjaldingarnar geva eina týðandi ábending um menningina í búskapinum. Vøksturin í lønarútgjaldingunum í 2003 og fyrstu 7 mánaðarnar av 2004 er minni enn árini fyri. Men tað er munur á menningini fyri tær ymisku vinnugreinirnar. Millum annað eru lønarútgjaldingarnar fyri fiskiskap minkað við umleið 5% fyrstu 7 mánaðirnar í 2004, meðan lønarútgjaldingarnar fyri tænastur eru vaksnar við 5% og 12% fyri byggivinnuna.

Tjóðbankin vísur á, at tað almenna eisini hevur onnur týðandi aktiv enn innistandandi í landsbankanum. Her verður hugsað um Føroya Banka og aðrar almennar fyritøkur.

# "Felags avgerðir og felags ábyrgd"

TÍÐINDASKRIV

Almennur fundur undir heitinum: "Felags avgerðir og felags ábyrgd"

Verður í kvinnufelagshúsinum á Glyvrum mikukvøldið kl 20.

Endamálið við fundinum er at gera kvinnurnar sjónligar, ið vilja taka felags avgerðir og felags ábyrgd til kommunuvalið tann 9. november 2004.

Umráðandi er, at kvinnur og menn í felag taka avgerðir um tey viðurskifti, sum ávirka gerandisdagin hjá bygdarfólknum. Í føroysku bý- og bygdaráðunum eru kvinnur undirumboðaðar. Til valið 9. november hevur veljarin møguleika at broyta hetta. Á fundinum mikukvøldið fara m.a. tey kvinnuligu valevnini í Eysturoynni at bera fram síni sjónarmið og ætlanir fyri bygdaráðsarbeiðið komandi valskeið.

Umframt kvinnuligi valevnini luttaka Annika W. Joensen, forkvinna í Javnstøðunevndini og Heidi Petersen, løgtingskvinna.

Eftir framløgunum verður lagt upp til kjak og spurningar. Til fundin bjóða vit ein drekkamunn.

Eysturoyingar - kvinnur og menn - møtið fjølment.

# Brúkarasamtakið pallborðsfund

*Tíðindaskriv*

Brúkarasamtakið skipar fyri pallborðsfundi um brúkaramál í ÍSF húsinum í Gundadali nú hóskvøldið 28. oktober 2004 klokkan 19.00.

Tiltakið byggir á eina frágreiðing, ið er gjørd undir norðurlandaráðharraráðnum, og viðgerð skipan av brúkaraøkinum í Grøn.-landi, Íslandi og Føroyum, Víðari er tiltakið skipað sum ein partur av aðalfundinum, og er sostætt einans fyri limir og innboðin. Men tað ber sjálvandi til at tekna seg sum lim við dyrnar.

Við pallborðið sita fyri Fólkaflokkin Óli Breckmann, fyri Sambandsflokkin Alfred Olsen, fyri Javnaðarflokkin John Johannesen, fyri Tjóðveldisflokkin Rubek Lilaa, fyri Vinnuhúsið Tummas Hanus Dam og fyri Brúkarasamtakið Erika Hayfield. Orðstýrari verður Turið Debes Hentze. Kjakið fer at snúgva seg um hvussu vit í Føroyum skipað okkara brúkaraøkið, við atliti til, hvussu gjørt verður í hinum útnorðurlondunum.


**HAVNAR BIO**
**Tlf. 31 19 56**
**www.bio.fo**




**Skúlasýningar verða fyrireikaðar**
Mikudagin 27.10. kl. $19^{30}$
Mikudagin 27.10. kl. $22^{15}$
Hósdagin 28.10. kl. $19^{30}$
Hósdagin 28.10. kl. $22^{15}$




Mikudagin 27.10. kl. $17^{45}$
Hósdagin 28.10. kl. $17^{45}$
*– Seinasta sýning*




Mikudagin 27.10. kl. $20^{30}$
Hósdagin 28.10. kl. $20^{30}$




Mikudagin 27.10. kl. $22^{45}$
Hósdagin 28.10. kl. $22^{45}$
*– Seinasta sýning*




Mikudagin 27.10. kl. $17^{30}$
Hósdagin 28.10. kl. $17^{30}$

**KOMANDI FILMUR**




**Frumsýning**
Fríggjadagin 29.10. kl. $20^{30}$
Fríggjadagin 29.10. kl. $23^{00}$